## VIÐMERKINGAR

# Eitt einki-stuttligt fimleikaævintýr

Einaferð vóru tað nakrar gentur, ið elskaðu at gera fimleik. Nakrar teirra vóru lítlar og nakrar vóru ungar kvinnur, men tær vóru allar fittar og erligar og vandu so nógv fimleik, sum tær kundu, tí tær vildu gerast so góðar, at tær høvdu møguleika at verða føroyameistarar í fimleiki. Tað høvdu onkrar teirra roynt fyrr, og tað var so góð kensla og stuttligt, at tað var vert at royna eftir aftur. Men hetta árið skuldi ikki vera sum vanlig ár, har tær í friði undir meira ella minni hálvvánaligum umstøðum vandu sín elskaða fimleik til kappingardagin á árinum, tá endaligi dómur fall um, hvørjar bestar vóru í landinum at gera fimleik.

Tað byrjaði við, at teir hægstu menninir í teirra parti av landinum koyrdu tær allar sum eina út úr teirra einasta tilhaldsstað og vístu teimum ikki rúm nakra aðrastaðni. Tað er ikki gott at hava gøtuna sum heim, og genturnar vistu ikki síni livandi ráð, tíbetur vóru hetta raskar gentur, sum elskaðu fimleik og fullvæl vóru greiðar um, at einki fekst »forerandi« her í lívinum, so eftir knøppum tveimum vikum høvdu tær funnið fram til eina lappaloysn og vandu sín elskaða fimleik undir botnvánaligum umstøðum.

Tær ætlaðu ikki, at tað skuldi síggjast á haminum, at tær høvdu verið gøtubørn eina tíð, og tí høvdu tær bílagt sær sera vakrar fimleikadraktir í føgrum litum, sum tær skuldu vera í tann dagin, slagið skuldi standa. Sjálvar áttu tær ikki nógvar pengar, og heldur ikki felag teirra, men tær høvdu fingið stuðul frá einum fittum felag, sum æt Føroya Tele, og so fóru tær til ein ítróttarhandil á Argjum at bíleggja vakrar draktir í føgrum litum og byrjaðu so smátt at gleðast til kappingardagin.

Av røttum áttu tær bara at hugsavna seg um sín elskaða fimleik, men menninir á Argjum, ið tær høvdu bílagt vøkru draktirnar frá, gjørdust alsamt løgnari, sohvørt longri tíð gekk frá, at upprunaliga freistin, tá tær skuldu fáa draktirnar, varð brotin. Eitt var, at teir hildu ikki orð, men teir fóru at lúgva so illa, at vanlig fólk høvdu rodnað, og nú kappingardagurin nærkast sløkkja teir fartelefonirnar og eru ikki at hitta á máli. Genturnar, sum elska fimleik, gerast fjálturstungnar, og enn einaferð vita tær ikki síni livandi ráð, men tær eru ikki býttar og ringja til tann, sum skuldi gera draktirnar, men hesin gerst kløkkur av fyrispurningingum, tí als eingin bílegging um vakrar fimleikadraktir í føgrum litum er komin úr Føroyum. Nú var heilt ringa lag á gentunum, ið elskaðu at gera fimleik:

Hvussu kundi nakar vera so ryggleysur og óerligur?! Og hvat skuldu tær gera?! Tað vóru ikki reiðiliga tríggir dagar til kapping hjá ungu kvinnunum og einir tíggju dagar til kappingina hjá lítlu gentunum! Enn einaferð royndu genturnar, sum elskaðu fimleik, seg sum »problemknúsarar«, tær fóru at ringja runt til øll møgulig fólk, sum høvdu gjørt fimleik fyrr og kundu hugsast at eiga ta ynsktu draktina, og eftir henda dag er álitið á mætar menn minkað, meðan teirra egna er vaksið fleirfalt, og næstu ferð tær skulu hava draktir, bíleggja tær sjálvar beinleiðis frá fyritøkuni.

Snipp, snapp, snúti, nú er søgan úti; vit verða ikki snýttar aftur, og Sportswear á Argjum er á svartalista hjá GJ-design.

Við fimleikakvøðu og vón um, at »ærlighed varer længst«.

Vegna kvinnu- og pinkuvenjararnar, Tóru Róin, Bjørt L. Joensen, Edith Dahl Olesen og Hildigunn Norðfoss

**Fimleikafelagið Ljósið**

# Til Moskva á Fiskivinnustevnu

FISKIVINNUSTEVNA

*Tíðindaskriv*

Menningarstovan hevur tikið stig til at luttaka á eini framsýning í Moskva saman við russiska konsulátinum. Framsýningin, FISH 2004, verður 21. - 24. apríl. Hetta er ein fiskivinnuframsýning, og er hon ma. áhugaverd fyri føroyingar, tí russisk reiðarí hava játtað at møta okkum har. Hesir marknaðarføringsmøguleikar verða m.a. sæddir í átakinum:

- Vísa á okkara strategisku plasering í Atlantshavinum
- Skipasmiðjur
- Veitingar og tænastur, sum føroysk virki kunnu veita russiskum trolarum
- Havnir og frystigoymslur
- Keyp og sølu av fiski/-kvotum

Russiski marknaðurin er í støðugum vøkstri, marknaðurin fyri ymisk fiskasløg er góður, og útlitini eru góð fyri marknaðin. Herfyri var í sjónvarpinum sagt frá um góða prísin á smáum upsa, og eisini hava vit fingið líknandi ábendingar um laksamarknaðin.

Aðrar vinnur, sum kundu komið uppá tal sum luttakarar eru byggivinnan og oljuvinnan. Innan oljuvinnuna er áhugi hjá russum at flyta tungolju til Føroyar, soleiðis at russisku skipini koma higar at bunkra, og hetta virksemi kann jú hava ringvirkningar.

## Føroyskur landabásur

Menningarstovan hevur bílagt eitt básøki. Her fara russisk reiðarí og onnur áhugað at møta føroysku fyritøkunum til skipað fundarvirksemi. Tiltakið verður skipað sum landabásur.

Føroyskar fyritøkur verða bodnar við á føroyska básin á framsýningini. Hetta er eitt einastandandi høvi til at knýta sambond við russiska vinnulívið. Russiska konsulátið hjálpir við at knýta sambond við russisk reiðaríir, og Menningarstovan veitir sambond við aðrar partar av russiska vinnulívinum, sum kunnu hava áhuga fyri Føroyar og føroyskt vinnulív.

Fyritøkur, sum luttaka á landabásinum, njóta hesar fyrimunir:

- Atgongd til skipaðan fundarbás
- Tulkahjálp: russiskt/føroyskt og enskt/føroyskt
- Teldu- og Internetatgongd á bási
- Egið logo á básinum
- Við í felags lýsingum
- Innboðið tiltak á básinum
- Við í framsýningarkatalogi við navni, adressu og stuttari lýsing av fyritøkuni
- Marknaðarupplýsingar um Russland (Møguligt eykagjald fyri upplýsingar frá donsku uttanríkistænastuni)

Básluttakarargjaldið fyri hesar tænastur er sett til Kr. 12.500,- fyri hvørja fyritøku.

Freistin at tekna seg er 18. mars.

Flogfelag Føroya skipar fyri beinleiðis ferð til framsýningina.

KAUPTHING
Virðisbrævameklarafelag



Vika 12, 2004
www.kaupthing.fo

# Yvirgangur aftur í andgletti

Herviliga bumbuatsøknin í Madrid hósmorgunin, hevði størstu ávirkan á marknaðirnar í farnu viku. Eftir at partabrævaeigarar fóru at staðfesta vinning orsakað av vánaligu arbeiðsmarknaðarfrágreiðingini, setti bumbuatsøknin dik á gongdina. Sostatt lækkaðu partabrøv og rentur munandi í farnu viku.

Hvørja ávirkan hendingin fær á hesa vikuna er tengt at, hvør endaliga fær ábyrgdina av atsøknini. Spanska stjórnin hevur lagt baskiska yvirgangsbólkin ETA undir at hava framt atsóknina, men tað seinasta nýggja í málinum er, at ein bólkur, ið sigur seg hava tilknýti til Al-queda, í einari video upptøku, átekur ábyrgdina av atsøknini. Hetta er kortini ikki váttað frá almennari síðu enn.

Eftir herviligu atsøknina tann 11. septembur 2001 gekk júst ein mánaði til partabrævamarknaðir vóru á sama stigi sum áðrenn hesa atsøknina. Trupult er at gita viðvíkjandi marknaðarpsykologi, men um endaligt verður staðfest at Al-queda veruliga stóð aftanfyri Madrid bumburnar, fer hetta at skapa fjáltrur á altjóða fíggjarmarknaðunum. Kortini vilja marknaðirnir vanda aftur til gerandisdagin sum fráliður, og hesir fara tískil aftur at leggja dent á grundleggjandi búskaparligu viðurskiftini.

Í farnu viku kunngjørdi Lundbeck ein góðan roknskap, ið tó var sum væntað, meðan ISS og Group4Falck kunngjørdu hampuligar roknskapir. Týski telerisin Deutsche Telekom kunngjørdi hinvegin ein vánaligan roknskap, ið tó var merktur av eingangsútreiðslum. Hesa vikuna kunngerð Vestas roknskap. Roknast kann við, at marknaðirnir gerast óstøðugir hesa vikuna orsakað av yvirgangsatsøknini í Madrid. Slíkir sorgarleikir skapa fjáltur á marknaðirnar og fáa íleggjarar at selja meira váðakendu virðisbrøvini, eitt nú partabrøv, og keypa meira tryggu lánsbrøvini. Fleiri áhugaverd lyklatøl verða kortini kunngjørd hesa vikuna og amerikanski tjóðbankin hevur rentufund. Hóast teir ikki fara at broyta rentuna, kunnu orð Greenspans fáa partabrøv og rentur at hækka.

Rentur

| | Renta | +/- %-stig |
|---|---|---|
| Diskonto | 2,00% | 0,00% |
| 2 ára lánsbræv | 2,36% | -0,03% |
| 5 ára lánsbræv | 3,36% | -0,04% |
| 10 ára lánsbræv | 4,04% | -0,05% |

Partabrævavísitøl

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| KFX, Danmark | 268,7 | -3,9% |
| OMX, Svøríki | 684,6 | -4,7% |
| DJ Stoxx 50, Evropa | 2.670,9 | -4,5% |
| S&P 500, USA | 1.120,6 | -2,3% |

Íløgufeløg

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 109,66 | 0,1% |
| Evru Lánsbrøv | 166,90 | 0,5% |
| Norrøn Partabrøv | 79,03 | -4,3% |
| Altjóða Vøkstur | 62,44 | -4,0% |

Gjaldoyru

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| USD | 605,95 | 0,9% |
| EUR | 745,17 | 0,0% |
| GBP | 1.097,34 | -1,3% |
| NOK | 88,02 | 2,3% |

*Renta og kursir kl 10 í gjár. Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan.*



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.



*Sunnudagin bleiv Jóannes Fonsdal prestvígdur og innsettur sum hjálparprestur við Suðurstreymoyar eystara prestagjald. Fremst á myndini: Jóannes Fonsdal, hjálparprestur, Hans Jacob Joensen, biskupur, og Bjarni Bæk, dómpróstur*

*Mynd: Jan Müller*

Jóannes Fonsdal, hjálparprestur:

# Nýggjur hjálparprestur vígdur og innsettur

**Sunnudagin 14. mars bleiv Jóannes Fonsdal prestvígdur og innsettur sum hjálparprestur í Suðurstreymoyar eystara prestagjaldi, hann er útbúgvin av Københavns Univeristeti, og varð liðugur við teologiútbúgvingina seinasta summar**

Hátíðarhald varð í dómkirkjuni í Havn sunnudagin 14. mars tá Jóannes Fonsdal av Skála bleiv prestvígdur og innsettur sum hjáparprestur í Suðurstreymoyar eystara prestagjaldi.

Jóannes Fonsdal er útbúgvin av Københavns Univeristet, og varð liðugur við teologiútbúgvingina seinasta summar og liðugur á pastoralseminarinum til jólar í fjør.

Suðurstreymoyar eystara prestagjald er størsta kirkjusóknin í landinum og er støðugt vaksandi. Til prestagjaldið hoyra Havnar Kirkja, Nólsoyar Kirkja og Kaldbaks Kirkja. Prestarnir við prestagjaldið eru nú Bjarni Bæk,dómpróstur, Sonja Klein sóknarprestur og nú eisini nýggi hjálparpresturin Jóannes Fonsdal.

Jóannes Fonsdal er 31 ára gamal, hann er giftur við Sigrid, sum ættað er av Viðareiði. Tey eiga hálvttriðja ára gamla Andreas og hálvtára gomlu Mariu Louise.

# Til Johannu Mariu Olsen, Vágur

## á 98 ára føðingardegnum 17. mars

Lag: Av øllum teim…

*Stinn tú stendur sum gomul eik,*
*væl fest í fosturlandi,*
*hetta landi tú aldrin sveik,*
*í tær livir fedranna andi.*

*Systkinabarn títt, próst Jákup Dahl*
*lyfti tann lýsandi loga.*
*Føroya fólki hann kom á tal,*
*som mikið hann teim vildi boða.*

*Úr Toftum vit eru slektaði øll,*
*frá Rádna bónda tí stinna,*
*sum saman við Nólsoyar Páll »flutti fjøll«,*
*á neyðini vildi vinna.*

*Hannemia, tú líkist svá*
*bóndans konu, sum fáar,*
*hon flutti kornið í hjøllum lá,*
*konubrot eru báðar.*

*Mikið tú fekst av Skaparans hond*
*gávur í stórum tali,*
*hvørt orð, hvønn setning gav lív og ond,*
*vitug í orðavali.*

*Ein kempa av sonnum, tú situr her,*
*einsamøll eftir av øllum,*
*merkisheilsan eg beri ter,*
*var stinnast av kvinnum og køllum.*

*Í Toftalíð søgdu øll, Gumman, góð,*
*hvørs mansbarn har soleiðis segði,*
*tú góðlynt var og bleiv aldrin óð,*
*alt gott í okkum tú legði.*

*Teim 100 tú nærkast, so mensk tú er,*
*ei bilar við tínum minni,*
*hvørt smáting tú minnist, nógv betur enn vit,*
*nú stákast tú einamest inni.*

*Gumman, vit takka tær fyri alt,*
*tað, vit frá tær hava nomið,*
*tað, tú hevur fyri okkum fortalt,*
*og alt, sum frá tær er komið.*

*Roðin í vestri um sólina sær,*
*Gud signi tær seinastu løtur.*
*Føðingardagin øll heilsa tær,*
*Føroyalands synir og døtur.*

Hjartaliga tillukku við 98 ára føðingardegnum.

*Kærar heilsanir*
**Jákup Olsen**

## Dagurin

**16. mars. Gudmundur**, deyður í 1237. Biskupur á Hólum í Íslandi. Fyri undurgerðir, sum hendu við grøv hansara, varð hann skírdur halgimenni.

Norrønt navn, ið merkir *Guð og verndari*.